Búskapar- og Løgfrøðingafelagið:

# Hópuppsagnir kunnu undirgrava rættartrygdina!

BLF NEVNDIN



Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum var í gjár úti við tíðindum um, at uppsagnir verða framdar í miðfyrisitingini, tí at miðfyrisitingin er bólgnað upp tey seinastu árini. BLF harmast almikið um at dugnalig fólk verða søgd úr starvi, og tekur frástøðu frá, at hetta verður gjørt við grundgevingini um, at miðfyrisitingin er bólgnað upp.

Hetta er eitt afturvendandi og ósakligt uppáhald, sum hoyrist allastaðni í samfelagnum. Spurningurin, sum BLF heldur ístaðin eigur at verða settur, er, hví miðfyrisitingin er vaksin síðan 80 árini?

Vit minnast øll støðuna í 80 árunum og fyrst í 90 árunum. Miðfyrisitingin var veik, og hetta var ein av høvuðsorsøkunum til, at landið endaði í djúpari búskaparkreppu. M.a. kom § 19 nevndin hjá løgtinginum í frágreiðingini um 80ini, tá ið hon skuldi lýsa, hvat tað vóru fyri tættir, bæði fyrisitingarliga og politiskt, sum førdu til, at samfelagsskútan kollsigldi, til hesa niðurstøðu:

»Hildið verður, at neyvan er grundarlag fyri aðrari avleiðing vegna heimildarloysi enn, at tað harðliga verður funnist at veiku, tilvildarligu og ófullfíggjaðu politisku og umsitingarligu støðuni í 80-árunum. Stórt eftiransni eigur at verða víst á lóggávuøkinum hereftir.«

Eftir at samfelagið var kollsilgt, hava nógv tiltøk verið sett í verk fyri at tryggja, at Føroyar ongantíð fara at koma í hesa støðu aftur. Vit hava fingið lóg um ábyrgd landsstýrismanna - og við henni var miðfyrisitingin umskipað við tí fyri eyga at styrkja tænastufunktiónina rundan um landsstýrismannin. Afturat hesum hava vit fingið eina rúgvu at øðrum lógum og eftirlitsstovnum, so sum fyrisitingarlóg, lóg um alment innlit, landsgrannskoðan og seinast løgtingsins umboðsmann. Alt fyri at betra um dygdina í fyrisitingini.

Vit eru farin frá einari veikari fyrisiting í 80 árunum til eina munandi meira professionella og dygdargóða fyrisiting, sum so dánt klárar at svara teimum krøvum, sum verða sett fyrisitingini.

Tað eigur at verða havt í huga, at ein av uppgávunum hjá embætisverkinum er at ansa eftir, at øll halda landsins lógir. Ein onnur sera týdningarmikil funktión hjá miðfyrisitingini er at tryggja sakliga og rættvísa viðgerð av málum, so sum í starvssetanum, uppsagnarmálum, umsóknum, kærum o.a., har ið tað hevur avgerðandi týdning fyri rættartrygdina hjá borgarum landsins, at frástøða er til politisku leiðsluna. Úrslitið av hópuppsagnunum hjá landsstýrinum verður, at miðfyrisitingin - millumliðið millum borgara og landsstýrismann - aftur gerst veik og ikki maktar at uppfylla hesa eftirlitsfunktión. Óttast kann tí fyri, at vit aftur enda í líknandi støðu sum í 80 árunum.

BLF heldur, at henda sokallaða sparingin hjá landsstýrinum er ógrundað, tí landsstýrið torir ikki at koma fram við, hvar tað skal sparast. BLF heldur, at tað er vánaligt, at politikararnir ikki tora at siga, hvat virksemi, sum miðfyrisitingin ger í dag, skal skerjast. Heldur enn at raðfesta hvørjar uppgávur, sum í dag verða loystar, ikki skulu loysast framyvir, so brúkar landsstýrismaðurin plenuklipparan og sker 10% av starvsfólkunum í miðfyrisitingi burtur!

BLF tekur eisini frástøðu frá orðunum, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum segði við útvarpið í gjár. BLF tekur hetta sum eitt stórt álop á starvsfólk í miðfyrisitingini.

BLF harmast eisini almikið um háttin, sum hópuppsagnirnar verða framdar eftir. Fakfeløgini eru ikki tikin við uppá ráð, og starvsfólkini vórðu kunnað um uppsagnirnar 1 SAMDØGUR áðrenn at hoyringsskrivini vórðu latin teimum, sum ætlanin er at uppsiga. Við hesum hava øll starvsfólkini í miðfyrisitingini gingið í óvissu um teirra framtíðarstøðu síðan í gjár kl. 11.30. Hetta var púra óneyðugt og átaluvert!


Eystara Bryggja · P.O. Box 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf 34 59 60 · Fax 34 59 52 · cargo@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM



ÍSLAND ▪ FØROYAR ▪ HETLAND ▪ NOREG ▪ DANMARK




HIN FØROYSKA FARMALOYSNIN

bert 1 tíma...

...tekur tað at røkka eina av farmastøðum okkara, tað sama hvar í Danmark tú ert.

SKJÓTLEIKI | TRYGGLEIKI | FØRLEIKI | SMIDLEIKI

Farmur fluttur við »ro-pax« skipi, hevur nógvar eyðsýndar fyrimunir við sær.

Umframt tað, at farmurin kemur skjótt fram á mál, so tryggjar skynsama »roll-on« og »roll-off« skipanin farminum eina skjóta og lagaliga avskiping uttan óneyðugar ristingar og harðliga handfaring.

Serkøn fólk og áralangar royndir innan farmaflutning er tín besta trygd fyri, at farmurin verður útflýggjaður móttakaranum júst sum vit fingu hann.

Í Danmark hava vit farmastøðir í Kolding, Hedehusene og Hanstholm. Tú kanst lata vøruna inn í Hanstholm leygardag, so hon verður í Tórshavn longu mánamorgun.

Okkara styrki...

- bóking á fráfaringardegnum
- stuttar innlatingarfreistir
- útgerð til allan farm
- flyta køli- frysti- og turrlastir
- tollavgreiðsla fyri kundan
- kappingarførir prísir
- høgt tænastustøði
- stutt transittíð

SMYRIL LINE

trygt, skjótt, lætt og gott...
...Smyril Line Cargo – SKILAGOTT


# Mentan á høgum støði

TÍÐINDASKRIV

Føroyingar eru við á lista- og hondverkarastevnu í Reykjavík hesa vikuna.

Vestnorden Arts and Arafts verður hildi í Laugardalshøllini í Reykjavík 16. - 19. september.

Stevnan var fyriskipað á fyrsta sinni Reykjavík í 2002. Við á stevnuni vóru fólk úr Kanada í vestri til Finnland og Baltisku londini í eystri. Málið við stevnuni er at vísa mentan og list á høgum støði í londunum í Vestnorðuri. Sjálvandi er lagt soleiðis tilrættis at høvi er hjá fólki at hittast, læra og hugtakað list úr øðrum londum. Somuleiðis er tað eitt mál at tá stevnan er farin afturum eru fólk komin at kennast og vónandi samskifta víðari um møguliga sølu av list og handverki.

Føroyingar hava verðið við til stevnuna fyrr. Hesuferð eru luttakararnir Vígdis Petersen, Helgi Joensen, Sirri og Tutl.

Vígdis sum er búsitandi í Keypmannahavn hevur á hesa stevnuni prýðislutir við sær, sí meiri um hvat hon fæst við á www.vigdis.dk. Helgi sum býr í Norra er helst mest kendur fyri sínar skulpturar og tað er eisini tað hann hevur við við til Íslands. Sí nærri á heimasíðuni www.helgijoensen.no.

Suðuroyar Ullvirki er sum kunnugt einasta spunavirki í landinum sum spinnur føroyska ull. Sirri tilvirkar pløgg úr úr hesum tilfarinum. Nýggja heimasíðan www.sirri.fo er helst forvitnislig at leita á. Tutl gevur sum kunnugt tónleik út, teirra heimasíða er at finna á www.tutl.fo.

Meiri um skránna á stevnuni sæst á heimasíðuni www.vestnorden-crafts.com



# Tríggjar nýggjar barnabøkur




**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út tríggjar barnabøkur, smábarnabókina Spæl og mal eftir Emmu Dodd, barnabókina Stóra bókin um Bibba eftir Barbro Lindgren og Evu Eriksson, og bókina Pápi er politistur eftir Lauru Trenter til tey 8-12 ára gomlu**

BÓKAÚTGÁVUR

*Tíðindaskriv*

**Spæl og mal** er ein stuttlig putli- og spælibók, har nógvir møguleikar eru at gnísta og lurta, mala og spæla. Bókin er 12 síður, við litføgrum myndum og stívari permu. Eyðna Magnussen týddi úr enskum. Bókin, ið er til tey heilt smáu, kostar 140 kr. í bókabúðunum. Hestprent hevur staðið fyri prentgerðini.

**Stóra bókin um Bibba** er savn við trimum søgum um ribbaldin Bibba. Søgurnar eru: Ribbaldurin Bibbi og mamman. Ævintýrferðin hjá Bibba og Ribbaldurin Bibbi fær ein hund. Søgurnar um Bibba eru sera stuttligar, tær bera upp á rím, og Alexandur Kristiansen hevur hegnisliga týtt tær til føroyskt. Bókin, ið er væl egnað til tey 3-7 ára gomlu, er 86 síður við litmyndum, er innbundin og kostar 120 krónur í bókabúðunum. Hestprent hevur staðið fyri prentgerðini.

**Pápi er politistur** er spennandi krimisøga til stór børn. Pápi Julian er politistur, og ein dagin, tá ið hann er til arbeiðis, verður hann skotin. Hann kemur undan við lívinum, men ræðslan fyri, at slíkt kann henda aftur, hvørvur ikki. Maðurin, sum læt skotið av, er limur í motorsúkklubanda, og tá ið Julian roynir at finna út av, hvør hann er, fær hetta avleiðingar… Jón Joensen hevur týtt úr svenskum. Bókin er 140 síður og kostar 120 krónur í bókabúðunum. Hestprent hevur umbrotið, prentað og heft bókina.








FØROYAMEISTARAR 2004

Til lukku!

HB

Føroya Banki ynskir HB hjartaliga til lukku við meistaraheitinum 2004 og við Løgmanssteypinum.

FØROYA BANKI